Eirikur í Jákupsstovu
Sirið Stenberg
Høgni Hoydal
Bjørg Brynhildardóttir Egholm
Sámal Petur í Grund
Bjarni K. Petersen
Ruth Vang
Steffan K. Poulsen
Jenis av Rana
løgtingsfólk

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 101/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Longd gildistíð, nágreina ella fáa heimildir til at skipa fiskiskapin, at boða frá útluting, at sýta útlendskum skipum at taka ímóti vørum, veitingum og at umskipa o.tíl., at avhenda rættindi at fiska av felagskvotu, at geva undantak frá at landa í Føroyum við fráboðan o.a.)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður nr. 4 strikað.

Nr. 5-13 verða eftir hetta nr. 4-12.

Viðmerkingar:
Skriv er sent øllum limum í Vinnunevndini, har upplýst verður, at landsstýrismaðurin er klagaður til Landsstýrismálanevndina, og at klaga er send formansskapinum um hetta uppskotið um broytingar í sjófeingislógini.

Í skrivinum verður serligur dentur lagdur á, at tvey hoyringarkriv til uppskotið um broytingar í sjófeingislógini ikki eru komin frá landsstýrinum til Løgtingið, og tí hevur Løgtingið ikki havt møguleika at viðgera hetta málið á fult upplýstum grundarlagi.

Í skrivinum verður heitt á tingið um at havna øllum uppskotinum, ella at strika partin, sum snýr seg um at strika § 22, stk. 2, í sjófeingislógini, ið hoyringarkrivini, sum mangla, í høvuðsheitum snúgva seg um.

Uppskotssetararnir meta tað vera óheppið at samtykkja eina lógarbroyting, sum ikki hevur skund, tá ávís hoyringarkjøl ikki eru send Løgtinginum, og landsstýrismaðurin hartil er klagaður til Landsstýrismálanevndina fyri ikki at veita Løgtinginum júst hesi hoyringarskjøl.

Tí mæla uppskotssetararnir til, at strikingin av ásetingini av § 22, stk. 2 verður slept, og at landsstýrið í staðin av nýggjum viðger, um og hvussu ein slík møgulig broyting skal gerast.

Á Løgtingi 25. mai 2026

Eirikur í Jákupsstovu | Sirið Stenberg | Høgni Hoydal

Jenis av Rana | Bjørg Brynhildardóttir Egholm | Sámal Petur í Grund

Bjarni K. Petersen | Ruth Vang | Steffan Klein Poulsen